# Bill Justinussen styrktur í trúnni



*– Eg angri ikki, at eg havi reista nakrar álvarsamar spurningar um viðurskiftini á Landssjúkrahúsinum. Eg vónaði, at tað fór at vekja ans og tað hevur tað gjørt, sigur Bill Justinussen, løgtingsmaður*

**– Eg veit, at ákærurnar ímóti Landssjúkrahúsinum eru harðar, men tað, sum er komið fram síðani, hevur ikki annað enn styrkt meg í trúnni upp á, at tað var rætt at reisa málið, sigur Bill Justinussen**

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað, sum er komið hesar seinastu dagarnar, hevur ikki annað enn styrkt meg í trúnni upp á, at eg gjørdi rætt.

Bill Justinussen, løgtingsmaður angrar ikki, at hann alment hevur sett fram nakrar álvarsamar spurningar um viðurskiftini á Landssjúkrahúsinum.

Hann boðaði um vikuskiftið frá, at so skjótt løgtingið kemur saman aftur, fer hann at seta landsstýrismanninum í heilsumálum nakrar álvarsamar spurningar um viðurskiftini á Landssjúkrahúsinum.

Í tí sambandi vil hann hava landsstýrismannin at svara um hann veit, at Landssjúkrahúsið sendir deyðiliga sjúk fólk til hús aftur og um landsstýrismaðurin veit av, at fólk, sum koma á Landssjúkrahúsið, tí tey ikki fáa fatur á kommunulækna, ikki sleppa inn, men verða vend í hurðini og send avstað aftur, uttan at koma undir læknahond.

Har vóru eisini aðrir spurningar um sjúkrajournalir, sum lógu og flutu, so at øll kundu síggja tær og um líkasælu í viðgerðini.

Hetta hevur vakt miklan ans og landsstýrismaðurin í heilsumálum var skakaður av, at ein løgtingsmaður kundi fáa seg til at seta slíkar spurningar fram alment. Hann helt, at hetta máar støðið undan tí áliti, sum almenningurin má og skal hava á Landssjúkrahúsið og hann staðfesti, at kundi Bill Justinussen ikki føra ítøkilig prógv fyri sínum ákærum, var talan um eitt álvarsmál fyri løgtingsmannin.

Tummas í Garði, læknastjóri, segði, at tey kundu ikki liva við slíkum og at Landssjúkrahúsið tískil hevði sett eina innanhýsis kanning í verk fyri at vita, um hald er í útsøgnunum.

### Rætt at reisa málið

Men hetta fær ikki Bill Justinussen at taka spurningarnar aftur.

– Eg setti spurningin fram tí at so nógv fólk hava kært sína neyð fyri mær um støðuna á Landssjúkrahúsinum og hetta eru fólk, sum sjálvi hava verið úti fyri øllum tí, eg nevni.

Men hann leggur afturat, at síðani hann reisti málið, hava so nógv fólk afturat ringt til hann, at hann er enn meiri sannførdur um, at tað er rætt at varpa ljós á viðurskiftini.

– Tey eru ikki so fá, sum hava ringt til mín og boðað frá, at tey kenna seg aftur í tí, eg havi nevnt.

– Eg vónaði, at hetta fór at vekja ans og tað hevur tað gjørt. Men eg eri ógvuliga fegin um tað stig, sum Landssjúkrahúsið hevur tikið, nevniliga at seta eina kanning í verk.

Hann heldur, at tað merkir, at Landssjúkrahúsið tekur málið upp við einum vilja til at bøta um støðuna og tað var endamálið.

– Hetta er tað einasta rætta, so tað eri eg fegin um.

– Endamálið var at rópa varskó og tað hevur eisini eydnast at fáa Landssjúkrahúsið at taka hetta til upp til viðgerðar.

Kortini heldur hann, at Hans Pauli Strøm fór nakað nógv í verjustøðu.

– Tað skilji eg ikki rættiliga, tí hetta er ikki eitt álop á hann. Hetta er ein spurningur um støðuna á Landssjúkrahúsinum og ikki eitt álop á landsstýrismannin.

### Mugu tosa meiri

Eitt, sum læknar og leiðsla á Landssjúkrahúsinum mangan føra fram, er tað, at Landssjúkrahúsið er til fólk, sum hava brúk fyri viðgerð, men at tað mangan eru fólk har, sum ikki hoyra heima har, men heldur skuldi verið á einum røktarheimi ella tílíkt. Men ongin hevur pláss fyri teimum og tí taka tey pláss á Landssjúkrahúsinum frá sjúklingum, sum veruliga hava brúk fyri tí.

Tað eru slík fólk, sum ofta verða send heim til heimarøkt av ymsum slagi at taka sær av, ella tí tey eiga at fara á røktarheim og tað kann misskiljast so, at Landssjúkrahúsið sendir sjúk fólk heim.

– Hatta kenni eg til. Men eg haldi, at tað er eitt dømi um vánaliga tænastu, at tey á Landssjúkrahúsinum ikki kunnu geva sær stundir at tosa við hesi fólkini um støðuna. Høvdu tey tað, ivist eg ikki í, at fólk, sum verða útskrivað, og teirra avvarðandi, høvdu góðtikið støðuna betri.

– Men tað er tekin um manglandi samskifti og manglandi pedagokikk á Landssjúkrahúsinum, at teir ikki kunnu geva sær stundir at geva fólki eina nøktandi frágreiðing um, hví tey verða útskrivað. Og tað er eisini eitt dømi um vánaliga tænastu, sigur løgtingsmaðurin fyri miðflokkin.

Og at fólk, sum koma illa sjúk á Landssjúkrahúsið, verða send til hús aftur, uttan at lækni so mikið, sum hevur kannað tey, kann ikki vera rætt og eg ivist í, um tað er lógligt av læknunum, leggur hann afturat.

– Endmálið er ikki at sáa iva og misálit á Landssjúkrahúsið, tí sum heild gera tey eitt dygdargott arbeiði, men tað eru mistøkini, eg vil til lívs.

– Og kann ein fólkavaldur løgtingsmaður ikki reisa eitt slíkt mál, veit eg ikki, hvør skuldi gjørt tað, sigur Bill Justinussen.

# Tílíkt má á ongan hátt góðtakast

**Slík dømi sum tey bæði í Sosialinum mugu á ongan hátt góðtakast, og er tað soleiðis má Landssjúkrahúsið taka málini upp, soleiðis at ávísar mannagongdir verða broyttar, sigur Hans Pauli Strøm, sum heldur, at Bill Justinussen hevur byrjað málið á ein ótrúliga ófantaligan hátt**

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

– Støðan er so keðilig, at Bill Justinussen hevur koyrt málið út í fjølmiðlarnar, men tey, sum spurningurin er ætlaður til, hava ikki fingið hann enn.

– Hetta er ein ótrúliga ófantaligur máti at starta eitt mál uppá, og vit eru næstan bakbundin frá byrjan, sigur ein bersøgin Hans Pauli Strøm.

Hann vísir á, at tingið kemur ikki saman fyrr enn 19. september og tá verður spurningurin frá Bill Justinussen fráboðaður løgtinginum. Síðani skal løgtingsformaðurin, Edmund Joensen, spyrja tingmanningina, um nakar hevur nakað í móti, at spurningurin verður svaraður.

- Hetta er ein formalitetur, men nakað sum skal gerast, sigur Hans Pauli Strøm, sum roknar við, at hetta verður gjørt einaferð í millum 20. og 22 september.

Ikki fyrr enn aftan á hetta fer Løgtingsskrivstovan at senda Hans Paula Strøm spurningin, og tá hevur hann so 20 dagar at svara í.

Við øðrum orðum merkir tað, at málið sum Bill Justinussen hevur reist, í ringasta føri kann standa opið og ósvarað til einaferð miðskeiðis í oktober.

### Málið tikið í størsta álvara

Men hóast Hans Pauli Strøm ilskast um framferðar háttin hjá Bill Justinussen, so tekur hann málið í allar størsta álvara.

– Hetta málið verður tikið í allar størsta álvara, og tað er longu hent nógv. Mánadagin var leiðslan á sjúkrahúsinum uppi í Almanna- og heilsumálaráðnum og viðgjørdi spurningin her. Formaðurin í Sjúklingaráðnum, Jákup N. Olsen, hevur eisini vent sær til mín og greitt frá, at tey langt síðani hava sett á teirra arbeiðsskrá, at ein nøgdsemiskanning skal gerast, og tey hava longu fingið tilfar hvussu hetta praktiskt kann verða lagt til rættis, sigur Hans Pauli Strøm.

– Hetta er eitt mál, sum verður tikið á stórum álvara, og slík dømi, sum Sosialurin greiðir frá, kunnu á ongan hátt góðtakast, og er tað soleiðis má Landssjúkrahúsið taka málini upp, soleiðis at ávísar mannagongdir verða broyttar, sigur Hans Pauli Strøm, sum at enda vísir á, at eisini løgmaður hevur verið í samband við hann og sagt, at hann ynskir eina frágreiðing.



**Tey dømini, tit nú borðreiða við hava vit nú beint víðari til depilsleiðsluna til nærri eftirkanningar, sigur Tummas í Garði, læknastjóri, sum ikki heldur at skipanin verður bøtt við einum kjaki í fjølmiðlunum**

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tummas í Garði, læknastjóri
# Nýta høvi at eftirkanna mannagongdir

Tummas í Garði, læknastjóri, sigur við Sosialin, at hann júst nú illa fær gjørt viðmerkingar til tey bæði málini, Sosialurin greiddi frá í blaðnum í gjár.

– Tað vit kunnu gera, og hava gjørt, er, at vit hava koyrt hasi bæði málini víðari til depisleiðsluna til nærri eftirkanningar, soleiðis at vit kunnu fáa staðfest, júst hvørjar hendingar talan er um.

– Men tað er sum at leita eftir eini nál í sátu.

– Tá so vit hava funnið fram til hendingarnar, fara vit at eftirkanna okkara mannagongdir, og um vit nú einaferð hava borið okkum rætt fram í hvørjum einstøkum máli, sigur Tummas í Garði, sum leggur dent á, at tey á ongan hátt ætla at fara í verjustøðu nú ákærurnar frá Bill Justinussen koma, men heldur nýta høvi at eftirkanna teirra mannagongdir.

Við Útvarpið mánakvøldið segði Tummas í Garði, at hann helt tað vera heilt út av lagi, at ein fólkavaldur politikkari setir fram slíkar ákærur í miðlunum, sum burdi verið ábyrgdarfullur fyri stovninum.

Við Sosialin í dag sigur Tummas í Garði, at heldur ikki at skipanin, sum nú er fyri so hørðum atfinningum, skal bøtast gjøgnum fjølmiðlarnar. Læknastjórin heldur, at Bill Justinussen átti at vent sær til tey fyrst, áðrenn hann fór í fjølmiðlarnar, tí tingið kemur ikki saman fyrr enn um tríggjar vikur, og tískil fær landsstýrismaðurin fyri avvarðandi økið, Hans Pauli Strøm, ikki svarað fyri seg í røttum stað fyrr enn tá.

Síðani Sosialurin borðreiddi við tveimum dømum um, hvussu fólk hava fingið eyðmýkjandi viðferð á Landssjúkrahúsinum, hevur depilsleiðslan roynt at funnið fram til, hvørji mál talan er um.
Í fyrra førinum, har ein 77 ára gomul kona ikki fekk neyðugu hjálpina, tá hon hevði brotið sær knæið, sigur Tummas í Garði, at tað halda seg hava funnið fram málið. Í blaðnum í morgin fer Tummas í Garði, læknastjórin, at gera viðmerkingar til, hvørjar grundir kunnu vera og hvørji viðurskifti kunnu gera, at fólk, sum í teimum báðum dømunum, føla at tey hava fingið eina ringa tænastu frá Landssjúkrahúsinum.